# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Ein heilsan til Unn

### Deyðans Tøgn

*Aftur bankaði á dyrnar í gjár, eg kendi ei títt andlit*
*Fremmandur ert tú tó ei, tú hevur vitjað her fyrr*
*Merkið eftir tíni myrku hond, og pínan av tínum kulda*
*Raka aftur vinfólk mong, og tøgnin er long*

*Nú biðið verður fyri tær, og fólkið lýður á tað orð*
*Við krossin stendur kistan ljós, og leigur oss á rætta kós*
*Vit ganga gjøgnum tokuna, svartur skari fylgir tær*
*Hoyr nú kirkjuklokkurnar, tær leiga okkum innum*

*Mong andlit eg síggi her og vinarbond eisini*
*Men tárini tey køva alt og gravarmunnin nærkast*
*Dapra ljóðið av himli ljóðar, deyðans songur valdar nú*
*Einglarnir í svørtum skrúð, koma at bera teg heim*

*Unga rósa, so blómandi, lívið títt knapt byrjað var*
*Vøkur orð um teg sveima her, góðan byrð á tíni ferð*
*Nú situr tú við Harrans lið og Jesupápin smílur við*
*Vakra eingil sín, Hann saknaði*
*Men nú kom hann heim.*

**Heilsan Steinunn D. Frýdal**

# Bjørklund 50 ár í Føroya Filatelistfelag



*Á fundi hjá Føroya Filatelistfelag sunnudagin 6. mai, sjálvan 50 ára dagin, handaði Álvur Danielsen, formaður í felagnum, tí 77 ára gamla Thorolfi Bjørklund eina gávu frá felagnum, sum var ein brævknívur við áskriftini "Thorolfi Bjørklund, 50 ár, Føroya Filatelistfelag"*

*Mynd: Hendrik Rubeksen*

Sunnudagin 6. mai 2007 vóru 50 ár liðin, síðan Thorolf Bjørklund í Havn gjørdist limur í Føroya Filatelistfelag.

Thorolf Bjørklund gjørdist limur í Føroya Filatelistfelag á fundi felagsins nr. 147 mánadagin tann 6. mai í 1957.

Thorolf Bjørklund er ættaður úr Finnlandi – sonevndur "finnlandssvenskari", men hann hevur búð í Føroyum síðan miðskeiðis í 50-unum.

Thorolf er ein veteranur innan frímerkjasamlarar í Føroyum. At savna frímerkir er ein lívsstílur hjá honum. Hann hevur verið ein drívkraft í felagnum øll hesi árini. Limirnir í Føroya Filatelistfelag kundu í fjør hátíðarhalda at 70 ár vóru liðin síðan felagið varð stovnað sunnudagin 28. mai 1936.

Tá vóru sjálvandi eingi føroysk frímerkir at samla uppá. Hetta var næstan 40 ár áðrenn føroysk frímerki á fyrsta sinni sóu dagsins ljós.

Teir sum stovnaðu felagið vóru: Petur S. Johannesen, Ingvard Jacobsen, Ole Breckmann, Jacob Jacobsen, Th. Pauli Christiansen og Eivin Isholm. Tá vóru sjálvandi eingi føroysk frímerkir at samla uppá. Hetta var næstan 40 ár áðrenn føroysk frímerki á fyrsta sinni sóu dagsins ljós.

Thorolf hevur ikki einans savnað frímerkir. Hann var í mong ár stjóri á bilasøluni P/F Vilhelm Nielsen & Søn í Havn. Eftir at hava arbeitt í fyritøkuni síðan 1957, tók

Thorolf við eftir verpápan Vilhelm Nielsen í 1970 og var stjóri har til 1986, tá fyritøkan varð seld. Thorolf var eisini finskur konsul í Føroyum í mong ár. Hann tók við eftir Edvard Mitens í 1970. Poul Michelsen í Havn tók við sum finskur konsul, tá Thorolf Bjørklund legði frá sær.

**mg**

# Arngerð og døturnar í Smiðjuni

Í sambandi við 65 ára føðingardag sín letur Arngerð Joensen í Hoyvík, saman við døtrunum Angelu og Moniku, upp eina framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Arngerð er útbúgvin lærari við list sum sergrein og hevur fingist við list í nógv ár.

Angela er psykologlesandi í Keypmannahavn. Hon er útbúgvin pedagogur og hevur málað í nøkur ár.

Monika útbúgvin pedagogur og gongur á listaskúla í Keypmannahavn.

Framsýningin letur upp hósdagin 10. mai kl. 14 og er opin til og við sunnudagin 13. mai. Allar dagar frá kl. 14-18.



*Hósdagin 10. mai letur Arngerð Joensen upp eina listaframsýning Smiðjuni saman við døtrunum Angelu (v.m) og Moniku (h.m.)*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæra mamma mín, vermamma og omma okkara

**Poulina Zachariasen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.
Takk til tykkum, sum lótu gávu til Akurin.
Ein serlig tøkk til Ellisheimið í Tórshavn fyri tykkara umsorgan fyri Poulinu, meðan hon búði har.

*Heilsan*

**John, Guðrið, Poulina, Magnus og Andrea**